


# Simme Musikkhús í nýggjum hølum

## Handilin Simme Misikkhús er fluttur í nýggj høli í Lucas Debesar Gøtu

Dagfinn Olsen

Ein býarmynd í Havn í Havn í meira enn hálva øld. So einfalt kann fyritøkan Simme Musikkhús lýsast.

Fyritøkan er áður flutt, eftir at hon húsaðist í Gongugøtuni, har Mica nú er, í mong ár. Síðani fór hon í SMS og niðan á Háls, og so oman í gongina undir Býarbókasavninum, har handilin hevur verið síðstu mongu árini. Tórhavnar Kommuna hevur ætlanir um at nýta hølini, har Simme hevur húsast, til býarbókasavn, og er Simme Musikkhús tí flutt.

Jón Magnus Bjarnastein rekur nú fyritøkuna, ið fyri stuttum flutti í nýggj høli í Lucas Debesar Gøtu. Hetta er aftanfyri bilstøðina Auto.

Har er gott og rúmligt, og hjá Simma eru tey væl nøgd vð umstøðurnar, og tey vænta at vera har næstu mongu árini.

dagfinn@sosialurin.fo



*Simme Musikkhús í nýggjm hølum í Lucas Debesar Gøtu í Havn*

*Mynd: Dagfinn Osen*



## Símun Samuelsen

málskjútti hjá HB í gjár

**Er tú troyttur í dag?**
- Eg merki, at vit spældu dyst í gjár. Beinini eru eitt sindur tung.

**Var tú heppin við málinum hjá tær?**
- Tað vil eg ikki siga. Eg rakti bóltin væl, og hann fór har, sum eg ætlaði. Tað var meira skil enn hepni.

**Hvussu hevur tú við, at føroyskur fótbóltur tapir ikki á heimavølli móti eysturrískum fótbólti?**
- Tað er eitt sindur undarligt. Eg hugsaði um tað aftaná dystin í gjár. Tað er okkurt sum bendir á, at eysturríkar hava tað trupult í Føroyum.

**Er munurin millum føroyskan fótbólt og eysturrískan fótbólti heili fýra mál?**
- Ja, tað vil eg siga. Men tað er prógvað fleiri ferðir, at vit kunnu vinna á teimum, hóast tað. Um tú er væl fyrireikaður og gevur alt tað, tú eigur, so kemur tú langt.

### Í MORGIN




Fleyr til gul av útnyrðingi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av útsynningi. Turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.

### FRÍGGJADAGIN




Gul til stívt andøvsgul av suðri , seinnapartin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.

### LEYGARDAGIN




Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og sunnudagin ælingur, men mánadagin yvirhøvur turt. Hitin millum 11 og 15 stig.

### LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt hátrýst, 1026 hPa. Yvir Atlantshavinum stendur mestsum í stað og ein hátrýstryggur til Grøanlandshavið kemur hendavegin.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Atlantshavinum fer spakuliga eystureftir og hátrýstryggurin til havið norðan fyri Føroyar verður yvir Føroyum hósdagin.

### HITALAG




### AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

13. juli Mánin næstur jørðini
18. juli Fyrra kvarter
26. juli Fullmáni
29. juli Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. juli | 03:47 | 16:13 | 02:47 | 15:13 | 03:02 | 15:28 | 05:47 | 18:13 | 06:47 | 19:13 | 02:02 | 14:28 | 01:02 | 13:28 | 04:02 | 16:28 | 05:02 | 17:28 | 03:32 | 15:58 | 04:47 | 17:13 |
| 22. juli | 04:39 | 17:04 | 03:39 | 16:04 | 03:54 | 16:19 | 06:39 | 19:04 | 07:39 | 20:04 | 02:54 | 15:19 | 01:54 | 14:19 | 04:54 | 17:19 | 05:54 | 18:19 | 04:24 | 16:49 | 05:39 | 18:04 |
| 23. juli | 05:30 | 17:54 | 04:30 | 16:54 | 04:45 | 17:09 | 07:30 | 19:54 | 08:30 | 20:54 | 03:45 | 16:09 | 02:45 | 15:09 | 05:45 | 18:09 | 06:45 | 19:09 | 05:15 | 17:39 | 06:30 | 18:54 |
| 24. juli | 06:19 | 18:42 | 05:19 | 17:42 | 05:34 | 17:57 | 08:19 | 20:42 | 09:19 | 21:42 | 04:34 | 16:57 | 03:34 | 15:57 | 06:34 | 18:57 | 07:34 | 19:57 | 06:04 | 18:27 | 07:19 | 19:42 |
| 25. juli | 07:05 | 19:28 | 06:05 | 18:28 | 06:20 | 18:43 | 09:05 | 21:28 | 10:05 | 22:28 | 05:20 | 17:43 | 04:20 | 16:43 | 07:20 | 19:43 | 08:20 | 20:43 | 06:50 | 19:13 | 08:05 | 20:28 |